Tíðindi.

Frelsens Hær.

Søndag Kl. 11: Hellighedsmøde. Søndagsskole Kl. 2. Friluftsmøde Vaglet Kl. 5. Børnemøde Kl. 6. Frelsesmøde Kl. 8,15.

Tirsdag Aften: Vaglet Kl. 8,30.

Deyður.

Ein av Føroya elstu skiparum, Johan Olaus Djurhuus í Porkeri doyði á sjúkrahúsinum á Tvøroyri fyri 8 døgum síðani. Hann var 70 ár. Hann var ein kendur og avhildin maður.

Amtslæknin

hevur nú sent út: »Medicinalberetning for 1936 for Færøernes Amtslægekreds.«

Tað er ikki nakað ljóst bílæt, hann gevur av standinum í Føroyum — tó at tað óivað er beint.

Í 1936 eru fødd 559 børn, og deyð eru 257 menniskju. Harav eru 16 deyð av tuberklum. Hetta ár eru færri fødd enn árið fyri, ið vísti eitt føðingartal, ið lá 30 hægri. So leingi nakar statistikkur hevur verið gjørdur yvir barnaføðing í Føroyum, er hetta lægsta promil (21,0). Hetta heldur amtslæknin, skyldast teim ringu korum, fólkið er statt í. Tá so talið á deyðum børnum í 1936 er ógviliga høgt, heldur hann einki vera at ivast í, at hetta eisini skyldast teim ringu tíðunum, tí tær føroysku møðurnar eru frálíka góðar.

Hann skrivar um vatnið í Føroyum, og heldur, at tær flestu bygdirnar hava gott kelduvatn, men nakrar, og harímillum Havnin, hava verið noyddar at brúkt árvatn, ið særliga aftaná nógv regn er gruggut og »ikke egentlig appetitlig.«

„Iceland“,

Esbjergarbátur, var á Havnini miðvikudagin. Hann var á veg til Onglands at selja og hevði fulla last av ísfiski.

Tvær sprittsølur.

Í síðsta blað søgdu vit frá nýggjari sprittsølu í Havn (Sýran). Tá einstok fólk hava tikið hetta fyri at vera einasta sprittsølan í býnum, skulu vit siga frá, at Anton Andresen enn sum áður selur spritt.

- VIKAN -

Leygardagin hendi í Húsavík ein vanlukka, ið kostaði eitt mannalív. Ein maður Gustav Viderø, hevði sett eina tjørupøs út á konfýrin at hita, og eldur kom í tjøruna. Ein kvinna, Nathalia Anthoniussen ið inni var stødd, tók pøsina og setti hana á gólvið; men tá var eldur longu komin í klæði hennara. Maðurin tveitti tjørupøsina út fyri dyr. — Eisini hann varð nakað kolaður. Bæði vóru tey flutt til sjúkrahúsið í Havn, har kvinnan doyði, at kalla alt fyri eitt. Hon var 60 ára gomul.

Tað frættist, at ministeriið hevur biðið Kvívíkskingar um at steðga arbeiðinum í royðugrótbrotinum fyribils.

Havnar skipasmiðja býður sær nú til at byggja skip. Teir hava gjørt tekningar til eina føroyska skipatypu.

Tak sjálvstýrisflokkin á tingi! — hann hevur valt Jóanes bónda Patursson í nevndina, sum skal viðgera reglugerðina fyri búnaðarráðnum. — Og hann lat seg velja!

Eitt paradís á fold.

Í august 1935 frættist um ein sera merkiligan flokk, sum fingið hevði valdið í einum stati í vestara parti av Kanada. Staturin eitur Alberta og maðurin, sum tók stýrisvølin í hond, nevnist harra Aberhart. Ætlan ella kanska rættari sagt politikkur hansara gekk beint tvørtur ímóti øllum tí politikki, sum fyrr er kendur her á fold.

Sum ógviliga rætt er, og sum øll hugsandi menniskju vita, so er nokk til í verðini av øllum sløgum bæði til mat og klæðir fyri oll menniskju á fold; men armóð er álíkavæl — einans av tí orsøk, at summi royna at leggja alt undir seg, og hini hava soleiðis eingi ráð at keypa. Fylgjan verður so tann, at tey, ið eingi ráð hava at keypa, mega svølta og líða neyð bæði líkamliga og andiliga — hetta skilja øll; men ein onnur fylgja er tann, at tey, sum rík eru og fegin vilja tjena meira við at selja til onnur, sleppa ikki av við teirra vørur, tí at tey fátæku ikki hava ráð at keypa. Hetta vilja javnaðarmenn broyta á tann hátt, at samfelagið skal eiga fabrikkir og tílíkt — eisini undirgrundina, sjálvandi — tí einans tá kann ágóðin koma teim arbeiðandi tilgóðar.

Harra Aberhart gongur aðra leið og býtir beinleiðis pening út til allar landsins íbúgvarar, fyri at teir skulu allir fáa ráð at keypa og harvið ráð at nýta alt tað góða, sum finnist á jørðini og slíkt framleiðast kann.

Hvussu gongst hjá harra Aberhart? Hevur hann fingið statin Alberta til tað paradís á jørðini, sum ætlan hansara var?

Um hesi viðurskifti er nýliga útsend ein lítil »pjesa« — bóklingur — sum mær er komin í hendi sendandi frá Danmørk.

Av tí, at eg eri vísur í, at heiðraðu lesarar fegin lesa nevnda bókling, taki eg hann uppí grein mína. Hann ljóðar soleiðis:

Social Credit.
Folkedividenden.

Major Douglas fødtes, som saa mange af den angel-saksiske races førende skikkelser, i det skotske lavland. Som ung ingeniør rejste han til Indien og fik ansættelse i den store elektriske koncern Westing House, hvis chef han blev efter faa aars forløb. Da krigen brød ud rejste han til England, traadte ind i hæren, hvor man snart bemærkede hans ekceptionelle evner. Han blev udnævnt til æresmajor og knyttedes som prisekspert til den engelske regering. I denne stilling lagde han særlig mærke til to ting:

I krigstid bryder det gængse pengesystem fuldstændig sammen og almindelige pengehensyn gælder ikke. Alt hvad der er nødvendigt til landets forsvar financieres uden videre og ingen spørger hvor pengene skal komme fra.

FÆRØSK MARGARINE
VITA NR. 1.
er altid frisk, er vitaminiseret,
er færøsk.

Vort nuværende pengeapparat lider af rent tekniske brist, der giver sig udslag i, at intet lands befolkning i vor tid kan købe end en brøkdel af de varer befolkningen selv er med til at fremstille. Douglas drog den selvfølgelige og dog saa triste slutning, at den manglende købekraft maa fremskaffes og fordeles ligeligt mellem alle borgere i landet, hvis alle skal faa del i den varerigdom, den moderne teknik har skabt. I 1919 udkom »Økonomisk Demokratie«, hvor Douglas for første gang udformede tanken om en folkedividende udbetalt til hver mand, kvinde og barn i landet, og i de følgende værker: »Social Credit« og »Honypoly of Credit« uddybedes den tanke. Hurtigt vandt de nye ideer indpas i Englands intellektuelle verden og begyndte saa smaat at trænge ind i den friere del af pressen, da pengemagten greb ind.

(Forts.)

Spent støða millum Japan og Rusland.

Tað frættist, at Rusmenn hava 50 krígsflogfør í eini kinesiskari provins og at 550 onnur eru klár at fara hagar. Hartil kemur, at nógvir russiskir kavbátar eru í kinesiskum havnum. Japan hevur o. u. 1 millión av hermonnum við landamarkið móti Ruslandi; so her er neyvan annað at vænta, enn blóðigur bardagi.

Frá Týsklandi

frættist, at 28 protestantiskir prestar um dagirnar vóru fastsettir. Ialt eru nú í Týsklandi fastsettir 145 prestar.

Lýsing.

Tað verður her gjørt kunnigt, at yvirlit yvir teir í Streymoyar sýslu valdu limir til nevningagrundlistan fyri tíðarskeiðið 1. februar 1938 til 31. januar 1939 liggur til skjals á býráðsskrivstovuni frá 1. til 12. desember h. á. (báðir dagar uppíroknaðir) frá kl. 9—14 og frá kl. 15—18.

Tórshavnar býráð, 19. nov. 1937.

Kunngerðing.

At roknskapurin fyri Tórshavnar kommunu, elektricitetsverkið og havnina fyri árið 1936 og úrdráttur av roknskapi fyri hjálparkassan við frágreiðing frá hansara starvi fyri sama ár eru til skjals á Býráðsskrivstovuni frá 25. november til 9. desember 1937 frá kl. 10—14, verður her gjørt kunnigt.

Tórshavnar býráð, 23. nov. 1937.

Ferðaætlan fyri s.s. ‚King'

Úr	Føroyum	3.	desember	1937
Í	Hamburg	7.	—	—
Úr	—	8.	—	—
Í	Hull	10.	—	—
Úr	—	11.	—	—
Í	Leith	13.	—	—
Úr	—	14.	—	—
I	Føroyum	16.	—	—

Pf Skipafelagið Føroyar.

Føroyskt hondmálað

postalín, keramik, træeskir, træ- og glasbakkar, veggplattir, små málarfiir og ymiskt málað uppá toy.

Stórt úrval av jólakortum.

Poul Arne Poulsen,
Tvøroyri.

Kulspørgsmaalet -- Kulkonflikten
og
Arbejderforeningen og Forstanderskabet i Frodebø Sogns Kommune.

(Forts.)

Som Svar paa Forstanderskabets Telegram fik Forstanderskabet følgende Telegram fra Amtet:

»Færøkul København har telegraferet til Mitens om at afvente Ingeniør Gernows Ankomst til Færøerne.«

Fra Mitens fik Forstanderskabsformanden saalydende Brev:

Harra Peter Mohr Dam,
formaður fyri Froðbyar sóknar kommunu,
Tvøroyri.

Eg fekk ígjárkvøldið tygara telegram um at biðja konstituseraða amtmannin fara suður at forhandla um kolamálið, og um at eg sjálvur eisini skuldi koma.

Eg talaði í fyrradagin og ígjár við amtmannin, og hevði hann tað hugsan, at Hans Mohr Mortensen og aðrir einstakir eigarar ikki høvdi rætt at forða fyri arbeiðinum í Rang- og Hvamhaga av tí, at so at siga allir eigararnir í 1935 hava undirskrivað deklaratión um, at teir góðkenna kontraktina av 1895, og deklaratiónin er tinglisin.

Hans Mohr Mortensen og hinir einstaki eri eftir Føroya-kols hugsan bundnir av kontraktini av 1895, sjálvtum teir ikki hava undirskrivað seinri, tí í teirra skjøtum stendur, at kolarætturin er fráseldur, og teir vita, at franskmenninir høvdu keypt og betalt fyri rættin, og kundu ikki sjálvir við matrikuldómin av 1930 vinna rætt ímóti betri vitandi.

Amtmaðurin helt tí, at Føroya-kol, um tað vildi, kundi og skuldi halda fram við arbeiðinum og kundi krevja hjálp frá politiinum. Tað mátti so vera ein sak hjá Hans Mohr Mortensen, um hann vildi, at venda sær til dómaran og royna at fáa niðurlagt forboð.

Eg telegraferaði til Føroya-kol, Keypmannahavn, og fekk soljóðandi svar:

Henstiller afventer Gernows Ankomst nærmere Forhandlinger Ejere og Bestemmelse Retssag.

So statt og tí, eg onga fullmakt havi, er tað til onga nyttu hjá mær nú at koma til Suðuroyar. Ingeniør Gernow kemur óivað skjótt, og um tað ynskist skal eg tá saman við honum koma til Suðuroyar.

Við hávirðing
(sign.) *Edw. Mitens.*

Efter Direktør Gerrows Ankomst til Tveraa afholdt Forstanderskabet et Møde med Repræsentanter for Jordejerne og A/S Føroya Kol.

Resultatet af dette Møde fremgaar af følgende

Udskrift af Forhandlingsprotokollen for Frodebø Sogns Kommune.

Aar 1937 den 28. Sept. afholdt Repræsentanter for Odelsejerne i Frodebø Sogns Kommune de Herrer Poul F. Joensen, Emil Hammer og Martin Vang, A/S Føroya Kol, repræsenteret ved Direktør Gernow, Bestyrelsesmedlem Sysselmand Djurhuus, Ingeniørerne Galle og Marstrander, samt Bestyrelsen for Arbejderforeningen »Fylking« Møde sammen med Forstanderskabet vedrørende Kulminedriften paa Tveraa.

Man fortsatte Drøftelserne af Sagen fra d. 13. Sept. d. A.

Den af Forstanderskabet til